Poli úr Kunoy:

# Partnarin hjá Jákup á Dul Jacobsen

**Øll hava hoyrt um Jákup á Dul Jacobsen og hansara stóra virksemi. Men Jákup sjálvur man vera tann fyrsti til at ásanna, at hann hevur ikki verið einsamallur um tað stóra ævintýr hann hevur skapt í Íslandi**

ÍSLAND
*Óli Jacobsen*
oli@sosialurin.fo

Ein av hansara samverkamonnum er Poli Purkhús, ættaður úr Kunoy. Hann hitti føroyska ferðalagið, sum var á ráðstevnu á Ørkini, tá vitjað varð á Rumfatalagerinn í Kópavogi seinnapartin leygardagin. Tá var tað Poli, sum saman við øðrum starvsfólki tók ímóti og sum greiddi frá.

Sum nevnt er Poli kunoyingur og 52 ára gamal. Pápi hansara var Poul Niklái, og mamman var Kristianna, ættað úr Hvalba.

Sum ungur var Poli eins og eisini Jákup sjálvur til skips. Hann fór eins og Jákup á sjómansskúla og hevði ætlað sær eina framtíð á sjónum. Hann endaði tó rættuliga skjótt í Íslandi, har hann fekk sær konu. Hon er Hanna, sum er dóttir Hilmar Magnusson av Akureyri, sum gjørdist kendur fyri tað íslendsk-føroysku orðabókina, hann gav út. Fleiri av døtrum Hilmars eru gifta føroyingum.

Poli og Hanna eiga 6 børn í aldrinum 10-20 ár.

Tað var Poli sum saman við Jákupi, ið byrjaði fyrsta Rumfatalagerinn í Íslandi í 1987.

### Trupul byrjan

Poli greiddi frá, at hetta var als ikki so lætt at byrja. Sum so ofta við nýhugsanum var ringt at fáa fólk at trúgva upp á hugskotið við hesum slagi av handlum.

Poli og Jákup høvdu avgjørt at opna handilin ein ávísan týsdag. Samband var longu fingið við Lars Larsen, Dyne Larsen, sum vildi lata vørurnar uppá borg. Men tær skuldu so fraktast til Íslands. Men tað var ikki bara sum at siga tað at fáa skipafeløgini at leggja last til eina so ivsama verkætlan. Men Samskip forbarmaði seg at enda yvir teir og vildi flyta fyrstu bingjurnar til Íslands uttan trygd fyri farmagjaldinum. Hetta hava teir ikki angra, tí fyrstu bingjurnar gjørdust til fleiri túsund!

Síðan skuldi fáast figging til raksturin. Her tyktist at vera sloppið, tá bankin játtaði teimum 3 mió. kr, inntil teir funnu útav, at tað sum teir hildu vera eitt lán í føroyskum krónur var íslendskar krónur!

Hetta gjørdi, at teir fingu trupulleikar at loysa vørurnar út, tí tollurin skuldi gjaldast, áðrenn vøran var útflýggjað. Hetta dróg út, og opningstýsdagurin nærkaðist í stórum. Men onkur góðvild hevur verið kortini, tí beint áðrenn afturlatingartíð fríggjadagin undan ætlaða opningsdegnum fingu teir vørurnar. So var uppgávan at fáa tær settar upp í handlinum. Ongin væntaði, at hetta kundi náast. Men brett var upp um armar, og tað eydnaðist. Týsmorgunin stóðu fólk í longum bíðirøðum fyri at sleppa inn. Tað var so nógv fólk, at løgreglan mátti koma uppí fyri at avmarkað talið av fólki í handlinum vegna trygdarreglurnar.



*Poli Purkhús og konan Hanna. Poli er samverkamaður hjá Jákupi á Dul og hevur havt stóran leiklut í handilsvirkseminum hjá Jákup í Íslandi*

### Handilin tømdur eftir einum degi

Handilin varð tømdur eftir einum degi, og so mátti bíðast eftir nýggjari vøru.

Síðan hevur tað gingið slag í slag. Í dag eru tríggir handlar í Reykjavík og ein í Akureyri. Í dag er settur stjóri Magnus Sigurðsson, sum hevur yvirskipaðu leiðsluna av teimum, meðan tað eru deildarleiðarar í hvørjum handli.

Handlarnir hava umleið 100 fólk í starvi, og í Kópavogi eru tey um 30. Tilsamas umseta teir árliga fyri um eina fjórðings milliard í okkara peningi, og sum tað skilst er tað ikki púra einki sum loypur av!

Handilin í Kópavegi virkaði øgiliga stórur, so sjálvt konufólkini í ferðalagnum mundu fingið propp. Í Íslandi er nógv sum er dýrt, men í hesum handli sást í hvussu er okkurt dømi um nakað, sum var sera bíligt. Tað var kovboybuksur fyri einar 80 f. kr. Tá er ikki ringt at fáa kundar!

Afturat hesum kemur uttanlandsvirksemið við handlum í nógvum londum, sum hevur verið nógv umrøtt í føroyskum fjølmiðlum.

---

Kári við Stein:

# Grønlandstíðindi úr Sisimiut

**Grønlandstíðindi hjá Kára við Stein vóru ein væl umtóktur teigur í FF-blaðnum. Nú hetta blaðið er niðurlagt er ætlanin at hesin táttur skal halda fram í Sosialinum. Kári greiðir dag fyri dag frá tí, sum hann heldur vera av áhuga í Føroyum**

**Týsdagur 20.februar**. Í dag eru – 2,7 stig og nógvur vindur av norði.

”Polar Timjarmiut”, sum skuldi koma inn higar at landa um mánaðarskiftið kom inn í seinnapartin. Teir vóru noyddir at koma inn at fáa gjørt ljóskastarar og antennur aftur eftir at vera bumbarderaðir av einum stórum æðuflokki. Har var nógv í sorli hjá teimum. Teir landaðu so tað, sum teir høvdu inni, eini 120 tons. Teir hava fiskað gott 1.000 t. í ein góðan mánaða, og hava landað heilt suðuri í Nuuk.

Tað er ein góður teinur at stima hagar norðanifrá úr kassanum. Teir loystu aftur mikudagin aftaná døgurða. Teir smærru bátarnir hava fingið væl av rækjum her um leiðir, har teir landa. Aðrir eru sendir suður til Pamiut at landa, tí her klára teir ikki at taka ímóti øllum.

Nú verður tosa nógv um at fáa opnað virkið í Aasiaat (Egedesminde í Disko buktini) aftur at taka ímóti rækjum. Avgerandi grundgevingin fyri hesum er, at øll innanskers kvotan ikki bleiv uppfiskað í 2006. Um 13.000 tons av rækjum svimja framvegis frá í fjør.

### Hvíthvalahvølja gull verd

Nakrir bátar hava verið og skotið hvíthval. Tað er gull, sum bjálvar tann hvalin. Teir selja hvíthvalahvølju fyri 150-180 kr fyri kilo. Hon smakkar ógvuliga væl, tá mann er komin í vana við at eta hana. Serliga væl smakkar hon við nógvum salti ella aromat. Hvøljan er um 1 centimetur tjúkk. Tað skullu nú ikki so nógvir hvíthvalir til at fáa eina góða dagløn. Teir størstu hvíthvalinir munnu vera um eini 8-10 skinn í støðd. Hvihvalur líkist akkurát grindahvali, men hevur so at siga slættan rygg, og hann er meira búkutur en grindahvalur. Kúlan er væl minni enn á grindahvali. Eg meini, at eg ørminnist, at ein hvíthvalur var vilstur einaferð í løtuni. ”Akamalik” hevur verið 60-unum inn á Klakksvík. Har gekk hann nakrar dagar. Kanska var tað onkra aðra staðni, men helst minnist onkur hetta.

### 23 februar

Í dag eru – 7.5 stig og eitt lot av skiftandi vindi. Ein vanlukka hendi umborð á einari jollu. Tað vóru tveir mans, sum vóru úti og skutu svartfugl. Tá annar maðurin skuldi skjóta, kom ein lítil skvampur, og skotið gekk av og rakti hin mannin í høvdið. Sum skilst doyði hann á staðnum. Hann sum læt lív var 63 ára gamal.

Frætt er úr Eysturgrønlandi, at har hevur riggað ógvuliga illa við veðri og ísi. Eisini hevur fiskaríið verið vánaligt. Summir hava toga í 6-7 tímar og hava 2 tons í hálið.

Sum skilst eru ”Artic Viking”, ”Havborg” og ein danskur bátur og so einir tríggir norðmenn har í løtuni. ”Akamalik” hevur verið inni í Íslandi og landa og er á veg vesturum at royna. Frætt er frá ”Atlantic Enterprice”. Teir hava veri inni í St. Anthony í Canada og landa, men máttu víðari suður eftir at fáa útgerð. Fyrrverandi ”Markus J” nú ”Katsheshuk” lá við maskinskaða á Flemish Cap, so teir máttu eftir honun og sleipa hann til lands. Tað tók teimum 56 tímar. Nú er so ”Atlantic Enrerprice” farin á svartkalvaveiðu.

### 26 februar

”Tarsermiut” er inni í Nuuk og landar. Teir hava fulla last eftir gott 14 døgum. Teir hava roynt bæði har suðuri og norðari. Har suðuri var botntemperaturirin 0 gradir. Síðan vóru teir her norðuri í Dýpinum. Har var temperatururin 4 gradir á botni. Har var eitt sindur at fáa. ”Tarsermiut” fer út aftur seinnapartin nýggjan túr.

### 28 februar.

Í dag er – 10,7 stig og stilli. Okkurt lítið kavaæl er av og á. Frætt er frá svartkalvatrolaranum ”Manu”. Teir komu til Manitsoq í nátt. Teir hava veri í SW kantinum og roynt, men har var lítið at fáa á teimum vanligu leiðunum. Hesar síðstu 10 dagarnar hava teir verið longri norðuri. Har var nakað at fáa, men ógvuliga ringur botnur. Har var eisini nógv skræðing. ”Manu” hevur 170 tons inni av svartkalva henda túrin. Teir fara nýggjan túr aftur í morgin við nýggjari manning.

### 1. mars.

Í dag er væl av vindi av norði og kavaælingur. ”Nanok Trawl” verður inni í morgin til landingartíð við ”Polar Amaroq” uppá sleip. ”Polar Amaroq” hevur um fulla last inni. Um alt gongur væl at fáa reservadeilin fram og flúgvilíkindini verða til vildar, skuldu teir kunnað loyst aftur mánakvøldið. ”Qaqaatsiaq” er inni í Nuuk og landar í dag.